# Geyti Áslaksson

*Geyta táttur*

Áslakkur droymdi dreymarnar,
segði teir ei for mørgum:
"Tóktist mær, sum Haraldur kongur
stýrdi grimum vørgum."

Rennur og rennur foli mín
á grønari grund,
mín ber ei á lund,
stígið dans á stund,
kátur leika foli mín
á grønari grund.

2. Áslakkur droymdi dreymarnar,
segði teir ikki smærri:
"Tóktist mær sum siglutrø,
tey gingu fjøllum hærri."

3. Svaraði Geyti, sonur hans:
"Vær gevum ei slíkt í geyma,
veturnáttin er so long,
at mangt kann bera í dreyma."

4. Tað var reysti Haraldur kongur,
stendur í fremra stavni:
"Hvar vitið tit tann bóndason
til útreið er mín javni?"

5. Svaraði kongsins lítil svein,
hann stendur í øðrum stavni:
"Bóndasonur á Upplondum
hann tykist at vera tín javni."

6. Tí svaraði Haraldur kongur,
letur av reiði renna:
"Er hann ei mín yvirmaður,
tú skalt á báli brenna."

7. So letur hann Haraldur kongur
síni skipini gera,
allar letur hann streingirnar
av reyðargulli vera.

8. Tað var reysti Haraldur kongur
sigldi út í hav,
gyltir ringar af reyðargulli
í hans homlum var.

9. Vinda upp síni silkisegl
gull við vovin rand,
strika ei á bunkan niður
fyrr enn við Uppland.

10. Tað var reysti Haraldur kongur
siglir við líðir fram:
"Fýsir meg í staðin upp
at skoða henda mann."

11. Kasta sínum akkerum
á so hvítan sand;
fyrstur stígur Haraldur kongur
sínum fótum á land.

12. Fyrstur stígur Haraldur kongur
sínum fótum á land,
tólv brynjaðir av hans monnum
undir hans hvørji hand.

13. Hagar var leiddur gangarin,
ið kongurin skuldi á ríða,
hann var klæddur við skarlak
niður á miðja síðu.

14. Hvítur var kongsin gangari,
søgur ganga frá,
svartir vóru hóvarnir,
men oyruni vóru grá.

15. Tað var reysti Haraldur kongur
heim í garðin fór,
úti sjálvur Áslakkur
fyri honum stóð.

16. ”Statt væl heilur, mín Áslakkur,
og so tín yngsti arvi,
hvar hevur tú hann á landi stevnt,
hvat hevur tín drongur við starvi?”

17. Tí svaraði Áslakkur
glógvar í gullinum reyða:
”Tú tarft ikki at minna meg
uppá mín sonar deyða.”

18. ”Hoyr tú tað, nú Áslakkur,
sig mær satt ífrá:
Hvussu heitur kirkjan tann,
ið tín son hvílir hjá?”

19. ”Hoyr tað reysti Haraldur kongur,
eg segi tær satt ífrá:
Í Kølnrín stendur kirkjan tann,
ið mín son hvílir hjá.”

20. Tí svaraði Haraldur kongur,
stígur fram yvir fold:
”Deyðan skalt tú hamin taka
upp úr døkkari mold.”

21. Enn svaraði Haraldur kongur,
sló tað upp við gamni:
”Deyðan skalt tú hamin taka,
vita, hann var mín javni.”

22. Tí svaraði Áslakkur,
glógvar í gulli enn:
”Hvussu skal eg hans bein nú kenna
burtur blant aðrar menn?”

23. Tað var reystur Haraldur kongur
ríður fram yvir heiði,
møtir hann einum ungum manni
komin av djóraveiði.

24. Møtir hann einum ungum manni
undir silkihúgvu,
kinnin var reyð sum hummarklógv
og eygað sum í dúgvu.

25. Møtir hann einum ungum manni,
eingin ið hann kendi,
silkihúgvu á høvdi bar
og finskan boga í hendi.

26. Haraldur so til orða tekur,
gott er at taka til evna:
”Sig mær ætt og heiti títt,
og hvussu skal eg teg nevna?”

27. Svaraði sá hin ungi maður:
”Hvat skal slíkum gegna,
Geyta Áslaksson
so skalt tú meg nevna.”

28. Svaraði reystur Haraldur kongur,
glógvar í gullið reyður:
„Hetta man vera tann bóndasonur,
ið os er sagdur deyður.”

29. ”Hoyr tað reystur Haraldur kongur,
hvat skal slíkum sæta,
at tú fert so víða um lond
alt eftir mítt navn at gæta?”

30. ”Hoyr tað Geyti Áslaksson,
eg geri tað ei at loyna,
til tess eri eg higar komin
roysni við teg at royna.”

31. Svaraði Geyti Áslaksson:
”Býðst ei betri nú,
allar leikir, sum tær viljið,
kjósi sjálvur tú.

32. Stong at skjóta, spjót at leggja,
jútskan hest at temja,
og til hvørjar útreiðir,
ið tær viljið fremja.

33. Stein at varpa, ørvum skjóta,
jútskan hest at taka,
tó vær leikum á sund um stund,
og tað man einki saka.”

34. Tí svaraði Haraldur kongur,
frá man frættast víða:
”Vit skulu oss á sundið út
at renna í streymin stríða.”

35. Teir fóru sær úr øllum klæðum,
aktaðu ei um bátar,
moyar og so konurnar
tær taka so hart at gráta.

36. Leiktu teir á sundinum
eina so lítla tíð.
Geyti vann av konginum
ein silvurbúin knív.

37. Leiktu teir á sundinum,
søgur ganga av,
Geyti helt tá konginum
hálva økt í kav.

38. Leiktu teir á sundinum,
so fór millum seggja,
kongurin kendi møði á sær,
hann biður at landi leggja.

39. Hann sá hvørki himmal ei jørð,
tá ið hann kom av sundi,
bóru hann so í eina borg
og sterkar stólpar undir.

40. Bóru hann so í eina borg,
hann skortaði ikki fíggja,
so er mær af sonnum sagt,
hann svav har dagar tríggjar.

**41**. Kongurin situr í hásæti,
tekur hann so til orða:
”Heintið mær Geyta Áslaksson
og stillið hann inn for borð.”

42. Geyti gekk í høllina inn,
kastar knív á borð,
kongurin situr í hásæti,
hann talar ikki eitt orð.

43. ”Niklas heitur mágur mín,
hann trýr so væl á Krist,
hann skal teg, Heming, á sundi spreingja,
hartil hevur hann lyst.”

44. Leiktu teir á sundinum
eina so lítla stund,
Geyti vann av Niklasi
ein silvurbúin pung.

45. Leiktu teir á sundinum
eina so lítla tíð,
deyðan førdu teir kongsins mág
aftur í grøna líð.

46. Kongurin situr í hásæti
sær á sínar ørvar:
”Nú skal boð til Geyta gera,
ongum gørpum øðrum.”

47. Geyti gekk í høllina inn,
kastar pung á borð,
kongurin situr í hásæti,
hann talar ikki eitt orð.

48. ”Hoyr tú Geyti Áslaksson,
hvat ið eg sigi tær:
Tú skalt skjóta valnøtur
av høvdi bróður at tær.”

49. ”Hoyr tað reysti Haraldur kongur,
tað sigi eg tær her:
Tú skalt tær á skógin burt
at vita, hvussu leikurin fer.”

50. Geyti fór á skógin burt
við sínum báðum broddum,
biður nú Guð og Ólav kong
at ráða for ørvaroddum.

51. Geyti legði ørv á strong,
Guð var honum við,
so skeyt hann ta lítlu nøtu,
hin stóð eftir kvirr.

52. Geyti legði ørv á strong,
Guð var honum hollur,
so skeyt hann ta lítlu nøtu,
ikki rørdist kollur.

53. Kongurin situr í hásæti
sær á sínar ørvar:
”Enn skal boð til Geyta gera,
ongum gørpum øðrum.”

54. Svaraði Geyti Áslaksson,
boð kom honum til handa:
”Nógv hevur reysti Noregis kongur
at gera í faðir míns landi.”

55. Geyti gekk í høllina inn,
og Hemingur nevndist hann har,
snarliga gekk tá seggur í sæti,
var bæði fimur og snarur.

56. ”Hoyr tú, Geyti Áslaksson,
siga skalt tú mær:
Hví hevði tú ørvar tvær
í gjár á skóg við tær?”

57. ”Tí hevði eg ørvar tvær
í gjár á skóg við mær:
Hevði eg dripið bróður mín,
onnur var ætlað tær.”

58. Tí svaraði Haraldur kongur,
heldur á reyðum ringi:
”Hoyr tað Geyti Áslaksson,
vit hittast enn á tingi.”

59. Svaraði Geyti Áslaksson,
hann heldur á øðrum ringi:
”Mongum er væl fjálvað um,
men ikki eru øll á tingi.”

60. ”Tú skalt renna for bergið tað,
ið heitur Hornið Háa,
haðan er eingin aftur komin,
ið skíðir hevur vágað.

61. Tríati favnar er tað breitt,
annað slíkt er tað hátt,
haðan er eingin afturkomin,
ið sær hevur skíðir vágt.”

62. ”Skal eg renna for bergið tað,
ið Hornið Háa er,
tú skalt standa á bergskorum,
og vita, hvørt leikurin fer.”

63. Tað var reysti Haraldur kongur,
fyrsta svøvn hann fekk,
tað var signaður Ólavur kongur
í dreymi fyri hann gekk.

64. ”Hoyr tú Haraldur, bróðir mín,
hvat eg sigi tær:
Leysa hav tú skikkjuna
í morgin yvir tær.”

65. Geyti legði skíðir á,
hann rann for Hornið Háa,
so treiv hann í kongsins skikkju,
hans lív stóð tá í váða.

66. Hann kom niður á bergskorar,
meti Guð hans neyð!
Hann var í ongum øðrum klæðum
enn skarlaksskikkju reyð.

67. Hann kom niður á bergskorar,
meti Guð hans trá!
Hann var í ongum øðrum klæðum
enn í ein kyrtil blá.

68. Tað var signaður Ólavur kongur,
honum var tungan snjøll,
hann bar mann úr bergskorum
fram á grønan vøll.

69. ”Hoyr tað, Geyti Áslaksson,
hvat eg sigi tær:
Drep ikki Harald, bróður mín,
so illa tað líkar mær.”

70. ”Hoyr tað, signaður Ólavur kongur,
so svari eg tær:
Lat ikki Harald bróður tín
koma for eygum á mær.”

71. ”Hoyr tað, Geyti Áslaksson,
hugsa nú við tær,
hvussu tit skulu í heimi liva,
hvørgin annan sær.”

72. Tað var Geyti Áslaksson,
vildi fara fyrst,
hann fór sær til Onglanda,
hann tók har vetrarvist.

Henda kvæðauppskrift finst í ”Søga og stev 3” eftir Árna Dahl.
Kvæðið er bygt á søgu í Flatoyarbók. Haraldur kongur harðráði, hann ið drap Einar Tambaskelvir, er á ferð í Norðurnoregi og vitjar Áslakk á oynni Torgum. Kongur hevur hoyrt um kappan Geyta, son Áslakk, og kongur vil royna roysni við Geyta. Men illa gekst kongi, og ikki er gott, tá illa grundaðir stórmenn tapa dyst móti tí minna. Geyti roynir fýra leikir: tveir á sundi, ein við bogaskjóting og ein á skíðum; og Geyti er úrmælingur í øllum leikum. Søgan um bogaskjóting Geyta er at finna í fleiri øðrum sambondum, nevnast kunnu søgnin um Palna Tóka og søgan um Wilhelm Tell. Framhald av Geyta tátti er Tostans táttur (Galta táttur). Haraldur kongur var hálvbróðir Ólav kong halga.

Tað er ikki óvanligt at stytta sjálvan Geyta tátt, soleiðis at byrjað verður við ørini 41: ”Kongurin situr í hásæti, tekur hann so til orða”. Jóannes Dj.